

*Føroyska aspektið í Fremad Amager er kanska ikki heilt so sjónligt í myndini úteftir. Men tað er ein partur av ætlanini, at hetta eisini skal menna framtíðar føroyskar landsliðsspælarar*

# Føroyska innrásin á Amager

**– Nei, tað hevur ikki verið stuttligt allatíðina. Als ikki. Niðurflytingin tók hart, Men innast inni hava vit allatíðina vit, at vit gjørdu tað rætta, sigur Todi, sum eitt ár eftir føroysku innrásina á Amager hevur fingið kritisku røddirnar at tagna og beint FC Amager á rætta kós**

Hans Jørgensen, Páll Klettskarð, Erling Jacobsen og Rókur av Fløtum Jespersen. Nei, hetta er ikki føroyska Formuladeildin vit viðgera. Staðið er Sundby Idrætspark á Amager, felagið eitur FC Amager og eigari er Todi Jónsson.

Eitt ár er liðið síðani Todi Jónsson á tíðindafundi tók føroyska og danska ítróttarheimin á bóli og kunngjørdi, at hann saman við øðrum íleggjarum keypti meirilutan í Fremad Amager. Ætlanin var, at felagið skuldi virka sum klekingarstøð fyri ungar evnaríkar fótbóltsspælarar úr Føroyum og Amager. Harnæst gjørdi Todi Jónsson eisini greitt, at felagið hevði sum málsetning at flyta upp í bestu donsku fótbóltsdeildina í seinasta lagi í 2010.

Danskir miðlar vóru skjótir. Lítla Fremad Amager, sum spældi í 1. division og vanligi danski fótbóltsfjepparin lítið og einki visti um, hevði brádliga fingið ein navnframan føroying við róðrið. Hesin fór undir verkætlanina FC Amager. »Fremad Færøerne«, »FC Færøerne« og »FC Thorshavn« vóru nøkur av eyknevnunum donsku fjølmiðlarnir royndu seg við. Men tá tað so vísti seg, at fólkini handan Amager-verkætlanina veruliga meintu tað, tey søgdu, broyttist hugburðurin mótvegis verkætlanini hjá Toda og hinum. Øll tey lítlu feløgini á Amager skulu knýtast saman í eina sterka eind, sum nøkur ár ætlandi skal kappast við FC København í toppinum í donskum fótbólti.

Stutt eftir at Todi yvirtók stýringina av Fremad Amager gjørdist greitt, at felagið fór at flyta niður í 2. divisón eystur. Men síðani tá er nógv hent. Ein stór útskifting í felagnum hevði við sær, at bæði venjari og stórur partur av hópinum varð skiftur út. Síðani hevur tað gingið sum eftir ánni. Tá vetrarsteðgurin kom hevði felagið einans tapt tveir dystir, lá fremst í deildini og alt bendir á, at teir flyta upp.

Úrslitini á leikvøllinum tala fyri seg. Men eisini kring felagið annars er stór framgongd. Fyri einum góðum ári síðani plagdu umleið 20 peningastuðlar at møta til morgunkaffi hjá felagnum, tá Fremad Amager spældi heimadystir. Til næstseinasta heimadystin í fjør møttu 125 fíggjarligir stuðlar. Hesi ting kunnu staðfestast av uttanveltaðum eygleiðarum. Men hvussu upplivir høvuðspersónurin sjálvur tað. Vit hittu Toda Jónsson á skrivstovuni á Sundby Idrætspark ein seinnapart miðskeiðis í marsmánaði – eitt ár eftir føroysku innrásina á Amager.

**Eitt hart ár**

– Tað sær gott út hjá okkum nú. Vit hava fingið fýra feløg saman, og tað er rættiliga positivt. Ítróttarliga gongur tað væl og fíggjarliga eru vit væl fyri, staðfestir Todi Jónsson. Men hóast standurin nú er góður og kanska betur enn tað eisini, so hevur tað ikki verið bara sum at siga tað at fáa gongd á FC Amager-verkætlanina.

– Seinasta árið hevur verið hart. Upp á allar mátar. Vit hava jú yvirtikið eitt felag, og roynt at savnað alt Amager í eina eind. Tað er krevjandi, so tað er ikki bara at biðja lova sær, heldur Todi fyri.

Men tað var júst tað, Todi gjørdi. Hann fór undir eina ovurhondsstóra uppgávu. Eina verkætlan, sum fólk á Amager hava tosað um í mong harrans ár, men eingin veruliga hevur hættað sær undir. Hví?

– Nú havi eg búð her í nógv ár, og eg skuldi gera eitthvørt,